Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.
(Heitið á løgtingslógini verður broytt, løgtingslógin fær stytt heiti, ein tøknilig broyting, og reglur um endurgjald til smærri vinnurekandi fyri lønarútreiðslur til starvsmenn, sum hava verið óarbeiðsførir vegna sjúku longur enn 4 vikur)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 151 frá 19. desember 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

"**Løgtingslóg**
um
dagpening vegna sjúku o.a."

2. Sum stytt heiti á løgtingslógini verður sett:

"**(Sjúkradagpeningalógin)**"

3. Í § 9, stk. 3 verður "fer í grunn" broytt til: "fer á frítíðarlønarkontu".

4. Aftan á § 13 verður sum kapittul 6 a sett:

"**Kapittul 6 a**
Endurgjald til privatar arbeiðsgevarar

§ 13 a. Privatur arbeiðsgevari, ið seinast álíknaða inntøkuár hevur útgoldið í mesta lagi 4 mió. kr. í lønum, kann søkja um at fáa endurgoldnar lønarútreiðslur til ein starvsmann sambært løgtingslóg um starvsmenn, ið hevur verið óarbeiðsførur vegna sjúku longur enn 4 vikur.
Stk. 2. Endurgjaldið verður gjørt upp eftir reglunum í kapittul 4 í løgtingslógini og verður bara veitt fyri tíðarskeiðið, sum fer út um 4 vikur.

§ 13 b. Markið fyri útgoldnar lønir í § 13 a, 1. pkt. verður javnað tann 1. januar á hvørjum ári við lutfalsligu lønarhækkingini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag árið frammanundan."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

Samtykt á Løgtingi hin 11. desember 2025 við 26-0-0 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 12. desember 2025

stjóri

LM-030/2025